# Aðalfundur

Aðalfundur verður í Norðurlandahúsinum, týsdagin tann **28. desember 2004 kl. 10.00 við hesi dagsskrá:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi
4. Val av nevndarlimum og eykalimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi og formansløn
7. Ymist. Ingrid Holm, sjúkrasystir, kemur at vera gestarøðari.
   Evnið verður »Skiparin sum fyrimynd«.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

SEV

# Kunngerð

## um afturlatingartíðir og vaktarhald hjá SEV um jólini og ársskiftið

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovur hjá SEV eru stongdar frá tollaksmessudegi kl. 16.00 til 3. januar 2005 kl. 8.00, og at øll linjuarbeiðir og skrivstovuarbeiðir o.a. sum tolir at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiði.

Vit hava vakt alt døgnið. Til ber at fáa fatur á vaktini á tlf. nr. 346800 í nevnda tíðarskeiði. Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða, sum t.d. streymslit.

Tórshavn, tann 16. desember 2004

**SEV**

# ALV søkir eftir starvsfólki til margfaldstovuna

**Vit síggja fegin at tú kanst**
- arbeiða við teldu, kopimaskinu, digitalmyndatóli v.m. Tænastur sum vit bjóða eru t.d. at taka avrit, seta upp, laminera, spiralinnbinda v.m.
- fyrimunir eru um tú hevur arbeitt við programmum so sum, Illustrator, Indesign, Photoshop, Publisher o.l.

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- at finna áhuga og førleika hjá næminginum. At menna, upplæra og geva næminginum vinnuligar royndir sum eru at javnmeta við vanlig arbeiðskor.
- talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum.
- at læra næmingin ymiskar uppgávur á margfaldstovuni og vera við til at geva gerandisdegnum innihald.

**Førleikakrøv**
- viðkomandi útbúgving
- evnir at læra frá sær
- evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur

**Vit bjóða**
- spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan

**Løn og setanartreytir**
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið
- starvið verður at seta 1. feb. 2005 ella skjótast tilber.

Meira fæst við at vita um starvið við at venda sær til:
Guðrun Guðjónsson, deildarleiðari á tlf. 25 32 00

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 7. jan. 2005**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovurin ALV**
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

brævbjálvin skal viðmerkjast »umsókn«

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3458,** P/F 13/10 2002, 380 Sørvágur.

**Viðtøkur broyttar:** 12.11.2004.
**Nýtt navn:** P/F Brynhild.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jákup Henriksen, 380 Sørvágur.
**Innkomin í nevndina:** Tummas Kristian Henriksen, 380 Sørvágur.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jákup Henriksen, 380 Sørvágur.
**Innkomin sum stjóri:** Tummas Kristian Henriksen, 380 Sørvágur.

Skráseting Føroya
tann 21. desember. 2004.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2926,** Sp/f Rás 2, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 30.06.2004.
**Adressa:** Søldarfjarðarvegur 11, 660 Søldarfjørður.
**Nýggjur heimstaður:** Runavíkar Kommuna.

Skráseting Føroya
tann 21. desember. 2004.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2732,** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 09.11.2004.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f SPEKT statsaut. revisorar (Sp/f KPMG, statsaut. revisorar).

Skráseting Føroya
tann 21. desember. 2004.

Kristin Balle

---









